## VIÐMERKINGAR

# Meining!

**Napolion Magnussen**
*Miðvágur*

Lurtaði við spenningi eftir løgmannsrøðuni Òlavsøkudag. Og eins og prædikan í Dómkirkjuni var sera góð og viðkomandi, helt eg somuleiðis at løgmansrøðan var góð. Eitt sindur liberalistisk og víttfevnd, men góð, og gav nógv at hugsa um. So er bara at hopa at andstøðan eisini verður konstruktiv og hjálpsom sum vit síggja eitt nú í Danmark, at stórmál ofta fáa eina breiða semju tvørtur um øll politisk mørk. At andstøðan gloymir "fullveldi her og nú"-tosi. Tí eitt er vist, at eydnast Visión 2015, eru vit púra leys av øllum og kunna tá slíta, loysa ella hvat tað skal verða. Eg vænti at danir ikki vilja av við okkum tá, og so kunna vit brádliga seta krøv sum ongantíð fyrr. Og um Høgni Hoydal heldur, at eingin politikkur var í røðuni, ja, so er at leggja til brots og seta sín dám á og fá sín politikk í, heldur enn at seta seg hendur í favn.

Verðin er nú so hátta, at tíðin krevur broytingar á ein ella annan hátt. Og sum fyrrverandi danski ES-mótstøðumaðurin Claus Larsen-Jensen segði: "Tú hevur tvey í at velja, antin at verða við at mynda framtíðina ella at lata verða. Og letur tú verða fær tú so heilt víst onga ávirkan". Og tí sá hann seg ongan annan møguleika at hava, enn at broyta meining og fara konstruktivt inn og kanska fáa ávirkan á avgerðinar.

Øll vita, at tá ið ein hevur við fólk at gerða sum bara siga "nei" ella "bíða", kenna vit útfallið: Er eitthvørt, sum ikki bleiv heilt eftir vild, eru tey skjót at rópa: "Eg segði tað altíð"! Og tey hava onga skyld í nøkrum, ella hvussu? Hevur tú ikki skyld í tí miseydnaða tá tú ikki hjálpur konstruktivt til ella kanska beinleiðis mótarbeiður tí?

Tað er bara ein vegur, og skal eg siga tað við einum orði: Frammeftir!

Tó, um henda Visión 2015 skal hava nakran møguleika, havi eg boð uppá nakað grundleggjandi, ið skal gerðast allar fyrst: At leggja kommunur saman. Tí bara í míni stuttu tíð í kommunalpolitikki havi eg sæð, at ringt er at fáa optimalt burturúr fyrrenn vit hava færri eindir. Sigst, at á Bornholm gekk illa við 9 kommunum at samstarva, men har ivist eg stórliga í viljanum. Treyðugt so, samstørv kunna fáast at koyra við góðum vilja, men ikki tað sum krevst fyri at fáa best og mest burturúr!

Tað er tó heilt greitt at við okkara 34 so ójavnum kommunum kann tað aldri harmonera. Hvussu kann Havnin samanlíknast við Fugloyar kommunu? Ella, fyri so vítt, Havnin við Miðvágs kommunu?

Sum dømi um hetta úr røðu Løgmans er nógv, ein kundi tikið framm. Og lat okkum nevna eina av "súlunum": Útbúgving! At øll skula hava eina útbúgving eftir fólkaskúlan. Alt gott um tað tí eitt landi í framgongd krevur nógv og væl útbúgvi fólk.

Og har steðga vit á. Tí har var ikki nógv um fólkaskúlan uttan ætlaninar hjá Hans Paula Strøm um frukt á skúlunum, øktur førleiki í enskum og betraði viðurskifti fyri teimum brekaðu. Øll hesi eru meir ella minni sjálvsøgd, men eru ikki onnur mál at fáa uppá pláss í fólkaskúlanum? Hvussu við hølisviðurskiftum? Eru tey eins góð kring landið? Hvussu við ólíka upplæring? Hvussu við matstovu og mati til børnini? Hvussu við sergreinum? Og hvussu við útbúnum lærarum og teirra viðurskifti og umstøður? Teir støðast illa, og skal tað ikki byrja gott hjá børnunum so kann alt gerða tað sama. Og helst eru fleiri mál eg kundi nevnt.

Hetta eru uppgávur, sum fyri ein stóran part liggja á kommununum at fáa uppá pláss, men sum fáar hava orku at lyfta, og kunna vit ikki bjóða líka góða grundútbúgving í eitt nú Vágum, kann alt gerða tað sama.

Góði Løgmaður, finn hitt gamla kortið fram aftur við teim 8-10 kommununum á og seti so av nýggjum strikur í eftir veruleikanum sum hann er ídag, so at tað kemur ein so góð javnvág í sum til berð.

Byrja við at seta ein sirkul um Suðuroynna, tí tvær kommunur har koma aldrin at einast um nóg gott samstarv óansæð. Tær smá hava langt síðani sæð skriftina á vegginum, men tær báðar stóru blíva bara samdar um at verða ósamdar við Landstýrið.

Seti so ein sirkul um Sandoynna, tí annars kann tað henda at Gerhard sleppur sær upp í Havnina bara fyri ikki at skula suður um sínuna. Teir hava ikki kunna einst um kloakkina frá Meginskúlanum, so har er helst ongin nóg góður diplomatur í oynni. Sjálvt um Sandoyggin verður minsta kommunan, kemur hon nokk at klára seg tá tunnilin er komin, og bert eitt korter er at koyra til Havnar.

So kemur tað tað stóra takið: Loysi Kollafjørð frá Havnini aftur, teir angra tað mestsum allir, kollfirðingarnir, at teir lótu seg lokka uppí, og hava beinleiðis veri eymýktir av Havnini líka síðani. Sjálvt Nólsoyggin hevur fingið meiri lova enn Kollafjørður, fyrst frá Jan & co, og síðani frá Heðin & co. Nýggjan barnagarð, nýggjan graslíkisvøll og hvat veit eg. Havnin er longu ov stór, men takið Kollafjørð frá teimum við løgtingslóg, um neyðugt, tey eru ikki havnarfólk men norðstreymoyingar. Kollafjørður skal uppí Sunda kommunu og tað skal Eiði við.

Kommunurnar í Vágum er so náttúrliga ein eind, og sum eisini kann útbyggjast við til eisini at fevna um Vestmanna og Kvívíkar kommunur, um teir ikki velja at fara saman við restini av kommununum í norðurstreymoy.

Allar kommunurnar á Skálafjørðinum eru ein náttúrlig eind, eins og Fuglafjørður, Gøta og Leirvík eisini eru, og allar Norðoyggjanar eru somuleiðis ein náttúrlig eind.

Eg veit væl, at nógvir løgtingslimir, bý & bygdaráðslimir eins og onnur við, loypa leys úr stólinum av hesum lesnaði, er ongin nevndur er ongin gloymdur. Men eitt er víst, at fólkið, ið einans situr í einum sessi fyri at tryggja seg og síni hevur Føroya land ikki brúk fyri. Og sambært bæði Stýrisskipanarlógini og Kommunustýrislógin er júst tað ólógligt. Politikarar eru fyrst og fremst settir at umsita allar ognir fólksins og landsins á besta og rættvísasta hátt fyri øll!

Størsti parturin av almennu lønunum ídag verða útgoldnar í Havn, ein lítil partur ferð úr Havnini og runt til tær nærliggjandi kommunurnar við teimum, ið búgva uttanfyri. Men fyri at tryggja eitt rættvíst samfelag verður Løgtingið noytt at finna eina útjavningarskipan sum tryggjar eina rættvísari fordeiling. Hetta er ikki nøkur nýggj skipan, slíkar skipanir eru allastaðir rundanum okkum.

Um ikki tað verður gjørt kann alt gerða tað sama og vit koma at enda í einum óendaligum stríði ímillum Landið, Havnina og hinar kommunurnar. Og um allar kommunurnar uttan Havnin finna saman í ein bólk kemur hon at tapa tann dystin. Tá enda tey kanska aftur sum fyrr, at skula biddaragongd út á bygd, tí vit uttanfyri koma at sita á øllum. So í míni verð skuldi Havnin viðurkent ójavnan, og lagt upp til hesa útjavning.

Hesi uppskot míni eru øll nøkur, ið krevja ein sterkan rygg og nakrar svølgdar elefantar, men tit, og vit, koma at síggja, at hetta er og varð tað einasta rætta.

# Langtíðar fíggjar- og íløguætlanir!

**Hans Birgir Hansen**

Eg havi fyri fleiri árum síðani skriva um langtíðar fíggjar- og íløguætlanir almenna-, privata-, land-, kommunu, ið ganga yvir fleiri áramál, ið skal lække kostnaðarstøði áðurnevndu.

Vit kunnu læra okkum at raðfesta/prioritera tað fíggjarliga og hvørju arbeiðir/størv, eru neyðug og tænastur, í vit skulu tillaga at tæna viðurskiftafólki eins, uttan mun, til hvør í ein er.

Eg havi áður víst á, at partur av vinningsbýti, skal nýtast at fáa lække skattaprosenti, land og kommunur og kostnaðarstøði í dag, út í hvørjari einastu kommunu í oyggjasamfeløgum.

Eg havi áður sagt, at tað skal geva land, kommunur fleiri inntøkur, vit sóu tá ið landspolitikiarar, uppi í løgtinginum, byrjaðu av fyrstan tíð, at lække landsskattin, lønmóttakarum.

Hetta er eisini galdandi, út í hvørjum húsarhaldi, fáa lært seg at raðfesta/prioritera rætt, tað fíggjarliga og hvat í ein ídag hevur tørv á at keypa og til dagligan rakstur og viðlíkahald.

Eg havi víst á týdningin, fáa konsolidera seg og seta part av vinningsbýti, til at standa ímóti fíggjarligu, sveiggjum, so at framhaldandi virksemi, verður tryggjað og størv og arbeiðir.

Eg havi víst á fylgjurnar, við minkandi virksemi og fáa skipa ta náttúrligu frágongd, eldri starvsfólk ið kunna arbeiða niðursetta arbeiðstíð, til hesi leggja frá sær vegna aldur í dag.

Eg havi somuleiðis víst á týdningin at fáa skipa ta náttúrligu tilgongd av yngri fólki, ið skal fáa tað praktisku upplæringina, so almenna-, privata-, land og kommuna fáa hække støði.

Eg havi nógv at draga saman um, í øllum tí ein hevur skrivað í bløðunum og fáa hække vitanarstøði hjá almenningum, ið hava skyldu til at fylgja nógv væl við, í bløðum og loftmiðlar.

Eg ferðist inn í tað hugsjónarliga-, atburðar-, hugburðarliga málsliga, ið ein viðgerð í lesarabrøvum og tilverugrundarlagi, øllum samfelagsbólkum og stættum, kring alt landið.

Eg havi ongantíð havt nakað dulsmál, hvat í ein hevur upp á hjarta, at fáa skunda undir alt etablerāða virksemi, kring alt landi og í Havnini/Suðurstreymoy, ið gongur alt ov seint í dag.

Eg haldi størsti parturin, hevur tikið allan kritikkin til sín, hava fingið nógv mikið at hugsa um beinráknu, persónslýsingar í eingin satt at siga roknaði við, skapti ringvirkningar.

Tað er avgerðandi neyðugt at geva øllum inside vitan/forstáilsi og tilvitan, til tað samanhangandi við løggávur/stýrisskipanir/dagligu mannagongdir/kunnog reglugerðir.

## TÍÐINDASKRIV

**Landsfelagið fyri fólk við autismu hevur sent soljóðandi skriv til almanna- og heilsumálaráðharran:**

*Søldarfjørður 31.07.05*

Til Hans Paula Strøm, landsstýrismann

### Viðvíkjandi játtanini til eitt heim til fólk við autismu í Klaksvík

Av tí at tað er komið fram í fjølmiðlunum (sí Dimmalætting 7. juli 2005 á s.5), at peningur er tikin frá einari játtan til eitt heim til fólk við autismu í Klaksvík, kenna vit okkum noyddan til at átala hetta.

Vitandi um, at tað standa fleiri børn við autismu á bíðilista til at koma til umlætting, er tað sera óheppið fyri foreldrini at hesum børnum, hvørs familjulív landsstýrismaðurin eigur at taka í ramasta álvara, at tey nú noyðast at bíða í uppaftur longri tíð eftir fáa umlætting. Tí hesar familjur eru frammanundan í einari sera strongdari og sárbarari støðu, skilt á tann hátt, at tey til dagligt mugu føra tvey familjulív í senn, t.v.s. eitt við barninum við autismu, og eitt við restini av familjuni.

Vit fara tí staðiliga at heita á landsstýrismannin um at syrgja fyri:

- at áðurnevndi frátikni peningur verður sum skjótast - t.v.s. í fíggjarætlanini 2006- latin aftur til játtanina til eitt heim í Klaksvík fyri fólk við autismu.
- og at hann framyvir áhaldandi játtar pening til umlætting og bústovn, sum kann verða við til at geva fólki við autismu og teirra avvarðandi eitt virðiligt lív her í Føroyum

Virðingarmest
vegna **LFA - Landsfelagið fyri fólk við autismu**

Lea Wolles, formaður